# Ætlar sær ikki frá

Borgarligi Atassut-flokkurin tapti kommunuvalið í Grønlandi fyrradagin. Afturgongdin var 5,2 prosentstig, og flokkurin misti serliga nógv í Suðurgrønlandi og í Nuuk. Tað hevur fingið fjølmiðlarnar at reisa spurningin um framtíðina hjá floksformanninum Finn Karlsen. Men hann ætlar sær ikki frá. Hann sigur við KNR, at kommunuval snýr seg í høvuðsheitum um lokalpolitikk og er tí ikki avgerandi fyri støðuna hjá floksformanninum.



*Finn Karlsen fer ikki frá orsakað av ósigrinum á kommunuvalinum*
*Mynd: KNR)*

# Lort í Býin í Vági

Leygardagin vitja Meyla og vinir í Vági og hava á skránni leik, sang og dans. Meyla og vinir hennara eru landskend fyri sangirnar frá fløguni Lort í Býin, og nú fáa børn í Suðuroynni høvi at uppliva stuttligu persónarnar og sangirnar á palli. Tiltakið verður í høllini í Vági leygardagin klokkan 15. Men umframt ber eisini til at tekna seg til dansiskeið, so ein dugir dansirnar, tá konsertin fer í gongd. Forsølan av atgongumerkjum til stóra barnatiltakið fer fram á Shell og Statoil í Vági og í Handlinum í Toftum í Vági og á Statoilstøðini á Tvøroyri. Tað eru 7.a og 7.b í Vágs Skúla, ið skipa fyri.

# Tænastustøðið skal útjavnast

**- Eg haldi, at flestu kommunur royna og vilja gera sítt besta, men at uppskotið hjá Búskaparráðnum kann gerast ein koddi hjá útjaðaranum, er lítið at ivast í, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu**



*Formaðurin í Búskaparráðnum hevur framløgu um eina kommunala útjavningarskipan*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

ÚTJAVNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Búskaparráðið hevur arbeitt við eini frágreiðing, sum lýsir, hvussu ráðið heldur, at ein kommunal útjavningarskipan kann leggjast til rættis.

Á fundi á Hotel Føroyum í morgun hevði formaðurin, Jørn Astrup Hansen, eina framløgu av tí tilfari og tilmælum, sum ráðið er komið til.

Sjálv framløgan tók ein tíma, har formaðurin legði tøl fram sum lýsa, hvussu støðan í ymisku økjunum í landinum er – við inntøkum og útreiðslum.

Hann vísti eisini á, hvussu ein møgulig útjavning millum ymisku økini í landinum kundi farið fram.

Jørn Astrup byrjaði við at vísa til samgonguskjalið, sum leggur upp til størri og skikkaðarkommunalareindir, so hesar gerast betur førar fyri at taka á seg fleiri uppgávur, samstundis sum javnt tænastustøði verður tryggjað um landið.

Búskaparráðið er av tí fatan, at skal eitt skilagott ábyrgdarbýti gerast millum land og kommunur, er fyritreytin, at vit hava færri –og størri - kommunalar eindir enn í dag. Hetta er eisini treytin fyri eini skilagóðari útjavningarskipan millum kommunurnar.

- Tað er okkara vón, at frágreiðingin, sum vit hava gjørt, kann gerast partur av kjakinum og hugskotinum hjá politisku flokkunum, sum skulu taka avgerðirnar, segði Jørn Astrup Hansen.

### Eins tænastustøði

Endamálið við eini kommunalari útjavningarskipan er, at tænastustøðið kring um í landinum skal gerast so eins sum gjørligt.

Hetta merkir, at fólk í útjaðaranum ikki skulu hava verri tænastustøði enn fólk á meginøkinum – og øvut.

Jørn Astrup Hansen vísti á, at viðurskiftini kring landið eru ymisk, og ymiskt kann vera, hvussu inntøkur og útreiðslur hjá kommunum eru.

- Tí er ikki bara neyðugt við eini skipan, sum útjavnar inntøkusíðuna, men eisini útreiðslusíðuna.

Hann sergði, at uppskotið hjá Búskaparráðnum ikki byggir á at gera seg inn á kommunala sjálvstýri, men heldur byggir uppskotið á, at ymisku økini í landinum vera betur før fyri at veita somu tænastur.



*Nógv fólk vóru á Hotel Føroyum í morgun til framløgu hjá Búskaparráðnum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Heðin sigur nei

Eftir framløguna hjá formanninum í Búskaparráðnum varð skipað fyri pallborðsorðaskifti. Við borðið sótu landsstýrisfólkini, Karsten Hansen og Helena Dam á Neystabø, Heðin Mortensen, formaður í Kommusamskipan Føroya og Asbjørn Djurhuus, formaður í Føroya kommunufelag.

Tað eydnaðist ikki Sosialinum at vera við til kjakið, men í gongini – undan framløguni hjá formanninum í Búskaparráðnum – segði Heðin Mortensen, borgarstjóri, seg als ikki taka undir við eini slíkari skipan.

Borgarstjórin er samdur í, at neyðugt er við greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunur, men hann tekur ikki undir við, at borgarar í høvuðsstaðarøkinum skulu rinda fyri borgarar úti um landið.

- Skulu vit tað, merkir hetta, at tænastan hjá okkum, sum hava so nógvar uppgávur at røkja sum miðstaður, lækkar. Skulu vit uppihalda hesi tænastu, noyðast okkara borgarar at gjalda uppaftur meira.

Hann vísti á dømir úr eitt nú Íslandi, har kommunur í útjaðaranum sita hendur í favn og bíða eftir einum kekki.

- Eg haldi, at flestu kommunur royna og vilja gera sítt besta, men at hetta kann gerast ein koddi, er lítið at ivast í, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

# Feløg á fund um Carlton-málið

**Í gjár frætti Sosialurin frá álítandi keldum, at Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið skuldu á fund um Carltonmálið í dag**

CARLTON-MÁLIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Framvegis røkist lítið fyri, at teir seks limirnir hjá Fiskimannafelagnum, sum vóru við pelagiska skipinum Carlton, sleppa umborð aftur í bræði, men í dag skuldi so ætlandi verða fundur millum Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið um málið. Um nøkur loysn fæst á hesum fundi, man vera ógvuliga ivingarsamt, so fastlæst sum hetta mál hevur víst seg at vera.

Mynstringarbannið hjá felagnum mótvegis skipinum stendur framvegis við og menninir, sum nú hava verið í landi – og uttan inntøku – í einar 5 vikur, duga ikki at síggja, at nøkur gongd er í málinum.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum heldur fast um, at skipið skal sigla eftir íðnaðarsáttmálanum, sum gevur 27% til manningina, meðan reiðarin heldur upp á, at skipið ber so nógv frá teimum gomlu ídnaðarskipunum, at hesin prosentsatsur er ov høgur.

Reiðarin hevur tí skotið upp, at millumverandi verður avgreitt í rættinum, at partarnir hyggja frameftir, og at Carlton frameftir sleppur at sigla við einum manningarparti svarandi til 23,24%.

Meðan stríðið stendur millum FF-formannin og reiðaran, missa dekkarar inntøku, tí hvørki reiðaríið, ei heldur felagið rindar teimum eina krónu, meðan arbeiðssteðgur er.

Við skipinum eru navigatørar og maskinmenn, og hóast bæði Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið hava heitt á sínar limir um ikki at taka upp arbeiði hjá limum FF's, sum eru í landi, siglir Carlton framvegis.

Á heimasíðunum hjá báðum hesum feløgum lýsa tey við, at "noktað verður limum at taka upp arbeiði, sum er rakt av mynstringarbanni…"

FSN lýsti hesa fráboðan 19. mars og Maskinmeistarafelagið 21. mars.